# Avvarðandi eiga at vita meira um minnissvinn

**Bæði hjúnarfeløgum, børnum, sonarkonum, versonum og øðrum avvarðandi tørvar betri innlit**

ALZHEIMER

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Minnissvinn ber í sær broytingar við henni ella honum, ið vit annars hava kent so væl. Vit kunnu betur læra at vera um fólk við minnissvinni, um vit kenna til sjúkuna, sigur Alzheimerfelagið, sum skipar fyri skeiði fyri avvarðandi á Tvøroyri tann 27. februar.

»Móðir mín leggur einki í síni ommubørn longur. Skitin klæði rekast í klæðnaskápinum saman við reinum klæðum, og hon verður ill, tá ið vit siga tað við hana. Hon hevur oyðilagt tríggjar kaffimaskinur seinasta hálva árið, tí hon koyrir kaffið har, sum vatnið skal vera.«

Hetta kundi komið frá einari ráðaleysari dóttur um sína minnisveiku móður.

Minnissvinn (demens) merkist fyrst og fremst á tann hátt, at minnið viknar, men tað ávirkar eisini eina røð av øðrum eginleikum; eitt nú vikna metingarevnini, torførari verður at leggja til rættis, eins og innlit í egna støðu og egin evni minkar. Tann minnisveiki missir evnini at skilja sambandið millum ymiskar gerðir, eins og evnini at læra og at fata nýggj fyribrigdi hvørva. Seinri í sjúkuni versna mál og málfatan nógv, og tað kann lættliga skapa álvarsamar misskiljingar. Tá ið tað hendir, verður tann minnisveiki ofta firtin ella óður og fer kanska enntá at hótta onnur.

Tí er umráðandi hjá avvarðandi at kenna og varnast tær broytingar, ið minnissvinn kann bera í sær.

Endamálið hjá Alzheimerfelagnum er m.a. at stuðla og hjálpa minnisveikum (demenssjúkum) og avvarðandi teirra og at upplýsa og kunna um minnissjúku (demens) yvirhøvur. Tí verður skipað fyri skeiðum fyri avvarðandi á Tvøroyri tann 27. februar og í Runavík tann 25.og 26. mars. Meira fæst at vita um hetta á www.alzheimer.fo. Eisini ber til at ringja á tlf. 313102.

ÓKEYPIS SPORING VIÐ KEYP AV DEKKUM www.kollsker.com

Vit umboða nú

VREDESTEIN
DESIGNED TO PROTECT YOU

VREDESTEIN er kosið besta vetrardekkið á øðrum ári



Vit umvæla ALLAR skaðar og ØLL bilmerki

BILVERKSTAÐIÐ
v/Hans Jacob Kollsker · Á Hjalla · Tel. 31 10 13 · Fax 32 10 15 · www.kollsker.com

Sosialurin / KsR 34 18.00

Lesið Sosialin -so eru tit við!

HEILSUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF HEALTH AFFAIRS

Kunning um heilsutrygdargjald

Í vikuni fer TAKS at krevja inn nýtt heilsutrygdargjald frá øllum føroyingum. Nýggja gjaldið kemur ístaðin fyri gamla sjúkrakassagjaldið, sum varð avtikið um ársskiftið.

Heilsutrygdargjaldið er eins fyri øll, 245 krónur um mánaðin, og verður tikið inn umvegis skattaskipanina. Børn undir 18 ár gjalda einki.

Fyrstu ferð verður goldið fyri bæði januar og februar mánað 2010.

Tey, ið ikki kunnu gjalda beinleiðis umvegis skattaskipanina, fáa inngjaldingarkort sendandi frá TAKS. Fyrsta inngjaldingarkortið verður sent tann 20. apríl.

Spurningar um heilsutrygdargjaldið kunnu setast skrivliga til TAKS.

TAKS, Postrúm 2151, Kvíggjartún 1,
165 Argir, taks@taks.fo.
Brævið skal viðmerkjast »Heilsutrygdargjald«.

Heilsutrygd er nýggj almenn heilsutrygdarskipan, ið tann 1. januar 2010 avloysti gomlu skipanina við 11 sjúkrakassum kring landið. Endamálið við nýskipanini er at tryggja øllum eina samhaldsfasta almenna heilsutrygd, har allir borgarar verða javnsettir viðvíkjandi inngjaldi og tænastum



Sosialurin / KsR 34 18.00

HEILSUMÁLARÁÐIÐ · EIRARGARÐUR 2 · 100 TÓRSHAVN · TEL 30 40 50 · FAX 35 40 45 · HMR@HMR.FO · WWW.HMR.FO